VI‹MERKINGAR

Eldrasamb‡li í Nes kommunu

Súni í Hjøllum
bygdará›slimur

Á fíggjarætlanini fyri 2000 setti Nes kommuna pening av til at byrja at fyrireika bygging av eldrasamb‡li.

Í heyst var› fari› undir útgravingararbei›i›. Øki› er nor›an fyri Føroya Banka á Toftum. Nevnast skal, at samstundis ver›ur eitt stórt alment parkeringspláss gjørt vi› sama øki›. Skúlin og onnur fara at fáa stórt gagn av hesum.

Núverandi bygdará› ætlar at seta av 1,5 mió. krónur til eldrasamb‡li› á fíggjarætlnini fyri 2001. Sostatt ver›ur møguleiki at gera øki› heilt byggibúgvi› og samstundis projektera sjálvt eldrasamb‡li› komandi ár.

N‡valda bygdará›i› má so taka stø›u til, nær sjálv byggingin skal byrja. Undirrita›i vónar, at viljin fer at ver›a gó›ur, tí longu bí›ilistarnir til ellis- og røktarheimspláss bo›a frá, at tørvurin er sera stórur. Hóast tey, sum arbei›a innan heimarøktina, gera eitt gott og samvitskufult arbei›i , so má ásannast, at mong eldri fólk sita í rættiliga stórum einsemi og partvís í hjálparloysi, tí ney›uga játtanin til skipanina er alt ov lág í mun til tørvin.

Ta› er tí sera umrá›andi at fáa bæ›i kommunal- og landspolitikkarar at vi›urkenna, at bøtast má munandi um umstø›urnar hjá teimum eldru. Landsfelagi› hjá pensiónistunum hevur gjørt eitt megnar arbei›i til tess at vísa á og l‡sa umstø›urnar hjá teimum eldru.

Vit eiga eisini at fegnast um tey framstig, sum eru gjørd seinasta ári›. M. a. kunnu kommunalpolitikkarar í Fuglafir›i, á Ei›i, í Vági og í Sundalagnum vísa á úrslit, sum a›rir eiga at læra av. Sum bygdará›slimur í Nes kommunu kann undirrita›i eisini fegnast um, at gongd er komin á hjá okkum. Vónandi ver›a fólk vald í n‡ggja bygdarrá›i›, sum vilja fullføra verki›.

Tey, sum nú eru eldri, hava tiki› tøk og lagt lunnar undir okkara vælfer›arsamfelag. Vit eiga tí bæ›i at geva teimum nógv betri umstø›ur og nógv betri tryggleika í framtí›ini.

Økir til vinnuvirkir

Terje Davidsen
valevni á sambandslistanum til Tórshavnar b‡rá›

Ein fyritreyt fyri øktum virksemi er, at ta› eru økir, har fyritøkur, størri og smærri, kunnu fáa at hava virksemi sítt á. Hetta er galdandi bæ›i fyri Kollafjør› og restina av kommununi.

Í Kollafir›i eru heilt fáir møguleikar fyri n‡ggjum innan fyri Langasand, me›an størri møguleikar eru á ídna›arøkinum á Oyrareingjum. Frystihotelli›, sum nú ver›ur bygt, kann hugsast kanska at virka sum rávørudepil til smærri gó›skingarvirkir. Har eru møguleikar at hugsa um.

Ein uppgáva í hesum sambandi er at fáa gjørt vegin til Signabø n‡tiligan. Hetta vegastrekki› er landsvegur, og tí er ta› ein landsuppgáva at fáa vegin gjørdan; her má ikki helmast í fyrr enn vegurin veruliga ver›ur gjørdur. Ta› er ikki nóg miki› vi› nøkrum peilipelum, men einum veruligum vegi. Og ta› eiga landsins myndugleikar at taka sær av.

Kommununar partur kann tó vera at streingja enn meira á fyri at fáa vegin gjørdan, til gagns bæ›i fyri íbúgvarnar á Signabø og fyri n‡tsluna av ídna›arøkinum á Oyrareingjum.

Illa umhugsa› navnagáva

Regin av Steinum



Ta› var sum at fáa vátan vøtt beint frammaná, at n‡ggja vaktarskipi› skal eita Brimil. Í fyrsta lagi er or›i› ljó›liga einki vakurt, og í ø›rum lagi er brimil - kallkyn av kópi — eitt djór, sum livir av fiski, og fer› eftir fer› hava menn skriva› til tingi› um at taka stig til at minka um kópin, tí hann oy›ir alt livandi inni vi› land. Aliringar hava heldur ikki fingi› fri›. Sostatt er væl hugsandi, at Fiskimálast‡ri› fer at senda Brimil at beina fyri brimlum anna›hvørt vi› skotvápnum eina gørnum.

Um ikki bar til at doypa skipi› Nólsoyarpáll, i› hev›i veri› eitt vakurt, hóskandi og sigandi navn, so mátti veri› ey›sæ›, hvørjum manni skipi› skuldi veri› kalla› upp eftir: Hvør stó› á odda í strí›num til tess at vinna tjó›ini óskerd rættindi á landgrunninum og heilt út á 200 fjór›ingar vi› eftirfylgjandi møguleikum? Somu lei›ir, sum n‡ggja glæstriskei›in skal verja og røkja.

Okkara fremstu listarmenn fáa nú — á ellisárum — eina hei›ursgávu frá tí almenna. Ta› er so sjálvandi, og veri ta› teimum væl unt fyri alt ta›, teir hava givi› almenninginum, tí enn sum fyrr livir menniskjan ikki av brey›i eina. - Toftafólk kalla›u n‡ggju kirkjuna upp eftir Frí›riki Petersen, b‡rá›i› gjørdi William til hei›ursborgara í Havn, og vágbingar reistu standmynd av Jákupi Dahl fyri kirkjudurum. Vakurt og rætt, og sømir seg einum menta›um fólki. At ste›ga á og minnast tey farnu er ikki ta› sama sum ódámlig persónsd‡rkan.

Tær almennu Føroyar áttu eisini at minst til undangongumannin Erlend Patursson, og nú var so eitt stak gott høvi til tess. Mátti hóska› serliga væl hjá júst hesum landsst‡rinum, i› hevur sett sær høg mál. Ella man ta› vera komi› av sær sjálvum, at harra Niclasen nú kann fara út í heimin at tosa vi› teir stóru um vei›irættindi hvør hjá ø›rum?

Navnagáva er ein partur av okkara mentan. Gamal si›ur er at kalla upp. Bæ›i fólk og fæ vór›u kalla› upp. Eisini skip og bátar ver›a kalla› upp. Tí áttu eisini Standfaraskip Landsins at virt eitt hevdvunni› skipanavn og ikki beint ta› í gloymskuna. Alt ta›, eg veit og minnist, hevur ein Tróndur veri›, men nú skal vera li›ugt vi› tí. Hví slapp almenningurin ikki at siga sína hugsan vi› t.d. eini navnakapping?

Nú ver›ur so nógv tosa› um at gera okkum sjónlig fyri útheiminum og fáa meira burtur úr fer›avinnuni. Ofta hava fer›afólk serlig áhugamál t.d. landsins søgu, náttúru ella almenn vi›urskifti, og tí liggur eitt ávíst reklamuvir›i ella l‡singarmøguleiki í nøvnum, i› hava havt stóran t‡dning fyri tjó›ina. Ta› er júst ta›, Postverki› ger, tá í› myndevni til frímerkini ver›a vald.

Vi›merking til Hjalgrím Samuelsen á Dimmalætting um bla›útbering:

Magnus Jørgensen
álitisma›ur, Postbo›bólkurin í Havn

Í tí›indasendingini í Útvarpinum hóskvøldi› 19.10. kl. 18.30 bórust tí›indi um privatisering av Postverkinum. Í sama tí›indastubba var sagt frá meiningini hjá Hjalgrími Samuelsen um útberingina av bløˆunum kring landi›,

o at hetta kosta›i alt ov nógv,

o og at bløˆini lógu upp til 16 tímar hjá Postverkinum.

Fleiri arbei›sbólkar hjá Postverkinum hava seinastu árini arbeitt vi›, hvussu henda bla›útbering kann gerast betri og bíligari.

Prísinum vi›víkjandi hevur ta› veri› solei›is, at tá Postverki› hev›i játtan á fíggjarlógini og eisini eftir at hon var strika›, hevur Postverki› eftir eini løgtingssamtykt goldi› fyri hvørt eintak av Sosialinum og Dimmalætting, ja útvi› 2 kr. fyri hvørt eintaki›. So her hevur veri› talan um einvegis tænastu so ta› forslær. Tá Postverki› sí›ani eftir vanligum markna›artreytum ditta›i sær at taka pening fyri bla›útberingina, skiltu bløˆini brádliga einki og fóru í herna› ímóti bla›útberingini vi› hóttanum um bæ›i eitt og anna›. Ta› sí›sta var, at postberarar skuldu ganga vi› posti um kvøldi› (nær skulu skrivstovur fáa post?) í myrkri vi› lummalykt. Her lekur álvarsliga millum teori og praksis. Alla a›rasta›ni í heiminum ver›ur postur útborin fyrrapartin á degi.

Men Postverki› skal framvegis rekast handilsliga, og hetta merkir, at vinningur helst skal vera av eini hvørjari tænastu, Postverki› veitir, og at allir sáttmálar ver›a hildnir.

Bla›útberingin er í dag saman vi› postútberingini, sum byrjar fyrrapartin hvønn dag, og sum á flestu umdømum kring landi› endar vi› vanligan dag umlei› kl. 13 ella fyrr. Hetta er ein gó› tænasta, har flestu fólk hava fingi› bæ›i postin og bløˆini á›renn døgur›a.

Hjalgrím ynskti eina seinrapartsútbering vi› bløˆum. Hetta merkir eina stóra eykaútrei›slu hjá Postverkinum, sum bla›útgevararnir sjálvandi ver›a noyddir at gjalda fyri. Men um stu›ul ver›ur veittur, kann henda bla›bering skipast uttan eykakostna›.

Okkara uppskot til bløˆini er, at tey koma út tann dagin, tey eiga at koma út, t.v.s. at tann 20. er 20. og ikki 19.

At bløˆini liggja so leingi hjá Postverkinum á›renn útbering kemst av tí einfaldu orsøk, at tey eru prenta› so langt frammanundan. Um – sum alla sta›ni í heiminum – deadline ver›ur flutt til t.d. kl. 21 og bløˆini koma út á mi›nátt, slept undan hesi longu bí›ití› hjá Postverkinum og tá kunnu vit tosa um veruliga kapping millum Sjónvarp, Útvarp og bløˆini.

Í Sosialinum leygardagin 21.10 er grein um evni›. Har ver›ur ført fram, at bla›útbering og l‡singar eru grundstu›ulin undir inntøkum Postverksins. Í ársroknskapinum fyri 1999 stendur, at brøv góvu 32,9 mill. tilskriftarleysar sendingar 3,2 mill. og bløˆ 3,7 mill. kr. So bløˆ og l‡singar eru »peanuts« í mun til brøv, pakkar og peningasendingar.

Fleiri íbú›ir til lesandi ungdómin!

He›in Mortensen
b‡rá›slimur sambandsvalevni tilTórshavnar b‡rá› www.hemorten.com

Í mong áratíggju hevur Havnin veri› sta›i›, har føroyski ungdómurin leitar sær, tá fari› ver›ur undir lestur her heima.

Náttúrligi leikluturin hjá høvu›sta›num sum lestrarmi›depil gerst ikki minni vi› tí›ini, og hóast undirvísingarstovnar ver›a fluttir út um Havnina, minkar íbú›artørvurin hjá ungdómi ikki her.

Tórshavnar kommuna hevur roynt seg vi› kollegiibygging Undir fjalli, men tann tørvur, i› har ver›ur nøkta›ur, er bert ein dropi í havinum.

Tí skal kommunan leggja ætlanir um fleiri slíkar byggingar, so okkara ungu skulu hava nøktandi umstø›ur, tá tey fara undir lestur í høvu›ssta›num.

Havandi í huga, at landi› ikki tykist hava ney›ugan vilja og hug at taka eitt tak á hesum øki, noy›ist Tórshavnar kommuna at taka um endan, sum ikki einafer›!

At ungfólk vi› avmarka›um lestrarstu›li skulu taka til takkar vi› hálvvánaligum kjallarakømrum fyri leigu, i› ofta kann liggja langt oman fyri veruliga leiguvir›i, kann eingin liva vi›.

Tí eigur at ver›a fari› undir bygging av hóskandi íbú›um, i› ung lesandi skulu leiga fyri ein prís, i› samsvarar vi› ta›, tey kunnu vera før fyri at rinda.

Og eins og gjørt ver›ur, tá finnast skulu eldraíbú›ir, eigur kommunan kanska enntá eisini at keypa hóskandi bygningar til endamáli›, tá ta› letur seg gera.

Sum høvu›ssta›ur eigur Havnin at bjó›a ungdóminum sømilig lestrarkor á øllum økjum, og tá eiga loysnir á íbú›artørvinum at standa frammarlaga!

VI‹MERKINGAR

Rættast at gera eina langtí›arfíggjarætlan fyri Klaksvíkar Kommunu

Steinbjørn O. Jacobsen
varaborgarstjóri

Nú leggur Klaksvíkar B‡rá› sí›stu hond á fíggjarætlan fyri ár 2001.

Sum flestum kunnugt hevur skuldin hjá Klaksvíkar Kommunu veri› ein ógvuliga tyngjandi partur av fíggjarætlanini og hóast ta› er lætna naka›, er skuldin enn tyngjandi. Vi› árslenda› er bruttoskuldin komin ni›ur á uml. 125 mill. kr. Fyri bert 8 árum sí›ani var Kommunuskuldin uml. 225 mill. kr.

Rentu og avdráttargjøld Kommununnar eru uml. 23 mill. kr. og ta› ver›ur tungt nøkur ár afturat, tí enn gongur ein tí› til skuldin er komin ni›ur um eina álíkning, sum í dag er uml. 86 mill.kr.

Rakstrarútrei›slurnar hjá Kommununi eru rættuliga høgar, so av teimum 86 mill. kr. er bert møguleiki til uml. 19 mill. kr. til íløgur, og tá hugsa ver›ur um íløgutørvin, so er ta› tungt at røkka á mál.

Íløgurnar til tey ymisku málsøkini røkka ikki til.

Av somu orsøk er trupult at fáa arbei›ini sum gerast skulu li›ug til lítar, tí ta› er so nógv, sum liggur á lání›, og tá so fíggjarætlan ver›ur løgd fyri bert eitt ár, ver›ur ein stø›ug togan millum málsøkini um at fáa nóg miki› avsett til tær ymisku ætlaninar Kommunan hevur fyri ney›ini og tær eru ikki so lítlar. Úrsliti› ver›ur, at ov líti› er til flestu ætlanir og so má arbei›i ste›gast (fyribils) og ta› stendur í hálvum gekki, tí eingin játtan er eftir, og royndirnar siga okkum, at ta› sum fyrst er ste›ga, er tungt at fáa gongd á aftur, ta› eru mong dømi› um ta›, harafturat førir hetta vi› sær meirkostna› hvørja fer arbei›i skal takast uppaftur.

B‡rá›i eigur tí at leggja á annan bógv.

Klaksvíkar B‡rá› má tí hugsa longur enn eitt ár og hetta er eisini ta› sum Føroya Landsst‡ri› hevur álagt kommunum í samband vi› íløgurnar. Ta› eigur at ver›a gjørd ein íløgu og rakstarætlan yvir umlei› fimm ár, og gjørd ein neyv ra›festing yvir hesi árini, so vistu øll sum búgva í Klaksvíkar Kommunu at arbei›ini vóru ra›fest yvir eitt áramál og kundu sæ› fram til eina ásetta byrjan, sum heldur og nær arbei›ini standa li›ugtgjørd.

Hugsa vit um tey arbei›ini Klaksvíkar Kommunu hevur ábyrgd av, sum standa í hálvum gekki, so kennist hetta syrgiligt, tí hvør borgari í kommununi er nøgdur, at bí›a í óvissu.?

Í Klaksvík, Ánunum, Grøv, Oyrum og Árnafir›i› eiga øll at trívast og hava ta› gott.

Ein hópur skrivar um stø›una á barnaansingarøkinum í Kommununi. Stø›an eigur at ver›a grei› hesumví›víkjandi. Vit eiga at gera eina ra›festing av hesum tørvi og kanna gjølla hvat kostna›urin ver›ur av ansingarstovnum i› lúka ásettum krøvum, uttan at ta› skal ver›a ein glasilig ætlan sum er ómøgulig at útvega pening til. Peningur má sí›an setast á fíggjarætlaninar sum gjørdar ver›a, so tey foreldur, sum enn ikki hava fingi› børnini á stovn ella í dagrøk vita, at innanfyri eitt ávíst tí›arskei› er tørvurin nøkta›ur. Vit hava júst sett ein samskipara av barnaansingarøkinum, sum skal fylgja upp tørvin í samband vi› bí›ilista o.a. sum sí›ani leggur tilmæli› fyri sosialu nevnd at taka› stø›u til. Hetta kemur at gera máli› nógv grei›ari og lættari at loysa. Bert í mínum f‡ra ára valskei›i, eru útvega›i uml. 140 fleiri ansingarpláss, tá er komandi ansingarstovnur vi› Kjalarvegin sum letur upp í decembur tikin vi›.

Tá ein Kommuna sum Klaksvík er í so stórari menning og arbei›i er til allar hendur, er ta› ábyrgd B‡rá›sins, at skapa teir karmar, i› eru ney›ugir fyri trivna›, so enn fleiri kenna trongd at leita sær hesa lei›ina og velja at búsetast her, eisini tey, sum noy›ast burtur í lestrarørindum.

Tjó›veldisflokkurin hevur álit, ikki bert á Klaksvíkini sjálvari, men eisini á tí fólki›, sum búleikast í Klaksvíkar Kommunu, ta› er jú fólki› i› byggir b‡ og bygdir. Polittikarin er fyri fólki›, men hava tey álit á okkum.? Hvussu gongur at halda ta› vit lova teimum.? Vel tann í B‡rá›i, sum tú hevur álit á.

Lati› okkum øll hava ta mál, at legggja okkara í, at her er okkum gott at búgva, og her trívast ung og gomul, uttan mun til førleika ella aldur.

Heildarloysnir

Maria á Dul
valevni Fólkafloksins í Tórshavnar Kommunu.

Nú stundar av álvara til b‡rá›sval, og mong eru tey gyltu lyftir, sum ver›a givin í hesum sambandi um dagarnar.

Vónandi eru flestu fólk so miki› at sær komin, at tey gjøgnumsko›a hesi lyfti.

Fólkaflokkurin hevur ikki hug at syngja vi› í hasum kórinum.

Ta› vit vilja, er at byggja ví›ari uppá ta›, sum vit vóru vi› til at skapa seinast Fólkaflokkurin hev›i veruliga ávirkan á b‡rá›spolitikkin í Havn.

Ta› var nevniliga tá grundarlagi› var› lagt undir planlegging av b‡lingum, vi› øllum sum hoyrir til tílík nærumhvørvi, millum anna› b‡lingshúsini.

Ta› var eisini tá røktarheim og vardar íbú›ir vóru bygdar, ringvegager›in og havnaútbyggingin vóru planløgd og byrja.

Sí›ani komu fyri øll Føroya Fólk nøkur ring ár.

Hesi eru nú naka› sí›ani farin afturum, men ikki hevur stórvegis veri› at sæ› til ta› frá sitandi b‡rá›ssamgongu.

Tó so, ta› sæst at fólkaflokshugsjónin livir, tí enn er ta› tann planleggingin frá 80`unum, sum liggur til grund fyri nøkrum av tí sum fer fram.

At valdar eru skrava›ar loysnir til m.a. b‡lingarnar er at harmast um, men ta› hevur Fólkaflokkurin hug til at gera naka› vi›, fær hann høvi til tess eftir vali›.

Hugsanin er at bussulei›in, útbygt og trygt vegakervi, b‡lingshús harundir barnaansing, bústa›ir til eldri, skal ver›a so tætt at b‡lingunum at skapa ver›ur eitt rættiligt nærumhvørvi.

Fólkaflokkurin veit at ein b‡lingur er meira enn bert nøkur hús á rekkju. Hann veit at talan er um livandi umhvørvi vi› fólki í øllum aldri og vi› ymiskum tørvi, og ta› ætlar hann at gera naka› vi›.

Til Bjarna Dalsgar›, sum í grein í Dimmalætting føldi tørv fyri at vísa á, at eg var flutt til Havnar, vil eg leggja avtrat: Hóast eg í løtuni búgvi í Havn, veri› eg so leingi sum eg livi Argjafólk, og eg eri á veg útaftur.

Eg dugi væl at síggja hvat tørvur er á úti á Argjum eins væl og innan alt valdømi› sum heild.

Gott val.

Føroyskt jólaoratorium eina fer› enn

Nú er ætlanin at fáa framført kórverki› "Føroyskt jólaoratorium" av Jóhan Mortensen eina fer› aftrat. Verki› var› skriva› og framført til jóla í fjør. Tríggjar vóru framførslurnar — tvær í Eysturoynni og ein í Havn. Frumframførslan var í Frí›rikskirkjuni í desember mána›i í fjør. Sangararnir vóru teir flestu úr Eysturoynni, men kortini komu nakrir úr Havn. Nakrir tónleikarar úr symfoniorkestrinum vóru so beinasamir at hjálpa til í samband vi› framførslurnar.

Í ár ver›ur túsundárahaldi› í samband vi› kristnibo›anina hildi›, og tí er ta› kanska ikki meiri enn rímiligt at roynt ver›ur at framføra eitt slíkt kórverk eisini í árinum 2000.

Nú ver›ur so kanna›, um ta› man liggja fyri hjá meginpartinum av sangarunum, i› sungu vi› í fjør, eisini at syngja vi› í ár. Skuldu a›rir kórsangarar havt hug at veri› vi›, eru teir hjartaliga vælkomnir.

Vit kunnu!! dømi: "Densuddhi" til Malaysia

Uni Danielsen
Valevni Fólkafloksins

Seinastu tveir dagarnar hevur oljurá›stevna veri› í Nor›urlandahúsinum, vi› útlendskum og føroyskum framløgum. Endamáli› vi› rá›stevnuni var m.a. at minna oljufeløgunum á hvørjar treytirnar eru fyri at arbei›a í Føroyum, og at fáa at vita frá oljufeløgunum hvørjar ætlanir tey hava, so føroysk vinna kann brynja seg til hesa vinnu. Eisini var ætlanin at fáa at vita, hvussu oljufeløgini fara at taka føroyska vinnulívi vi› í sínum arbei›i.

Oljulóggávan setir tey krøv, at flutningur til oljuvinnuna av gó›si og fólki skal fara um føroyskan kajkant ella føroyska floghavn. Ofta ver›ur ført fram at hetta kemur at d‡rka framlei›sluna hjá oljufeløgunum, og solei›is er ta› uttan iva í mongun føroum. Men ta› skal ikki gerast til ein generellur holdningur ar ta› blívur d‡rari av tí grund. Allarbesta dømi um at ta› ikki er so, er "Densuddhi", umhvørvisskip til Malaysia, "Sisak 2", 3 og 4, politibátar til Grønlands, "Højestene" ferja til Svendborg. Øll hesi skip, har Skipasmi›jan í har›ari kapping vi› a›rar skipasmi›jur megna›i at levera til kappingarførar prísir, hóast ta› at fjarstø›an er sum hon er. Hetta kann einans lata seg gera vi› gó›um arbei›sfólki, gó›ari lei›slu og eina trúgv uppá at vit kunnu.

Sjálvt um hetta er valgrein til b‡rá›svali› í Tórshavnar Kommunu, kann eg ikki lata vera vi› at nevna onnur dømir m.a. El-Service á Skála sum hevur arbei›ir í Danmark, Vietnam, Bangla Desh. N‡liga hoyrdu vit um Hydro Tech sum er í fer› vi› at byggja tveir alibátar til Skotlands. Onnur dømir eru aliútger› úr Fuglafir›i til Chile og proviantering av skipum í Hirtshals úr Føroyum. Og sjálvsagt ikki at gloyma allur tann fiskirei›skapur sum ver›ur útfluttur. Ta› er als IKKI nøkur sjálvfylgja, at fjarstø›an er ein prís- og kappingarfor›an.

Ta› sum kommunan kann gera fyri at vit framhaldandi kunnu vera kappingarfør er, at skapa gó›ar vinnukarmar fyri vinnlívi› at arbei›a undir.

Arkitektar í nevnd

6. okt. helt Arkitektafelag Føroya a›alfund. Nevndin bleiv afturvald. Í henni sita: Rúni Abrahamsen, forma›ur, Albert Isfeldt, kassameistari, og Magnus Magnussen, skrivari.

Arkitektafelag Føroya var› stovna› í 1981 og hevur 38 limir.

St‡risval í Yrkisfelagnum

St‡risval hevur veri› í Yrkisfelagnum. Øll, i› sótu í gamla st‡rinum vóru afturvald. St‡ri› hevur skipa› seg á henda hátt:

Forma›ur Kristinbjørg Høgnesen.

Skrivari Kári Jespersen.

Kassameistari Poul Erik Smedemark

5. limur Kaj Alstrup.